Ár 2009, hin 22. september

65.

09/00207 Farloyvi frá býráðsarbeiðinum – Hans Arne Bertholdsen.

Hans Arne Bertholdsen, býráðslimur, hevur áður boðað frá, at hann er farin út at sigla, og at hann tí verður burturstaddur í tíðarskeiðum. Sambært upplýsing frá løgfrøðingi KSFs er einki í vegin fyri, at býráðið játtar Hans Arna farloyvi eftir hesum leisti, har næsti maður á listanum tekur sæti í teimum tíðarskeiðum, tá ið Hans Arne er burturstaddur, og at Hans Arne tekur sæti aftur í teimum tíðarskeiðum, tá ið hann er heima.

Í skrivi 7. sept. 2009 boðar umsitingin frá Hans Arna Bertholdsen, at hann aftur verður burturstaddur frá primo september, og at næsti persónur á sambandslistanum, sum er Jákup Skoradal, tískil tekur sætið.

Sostatt tekur Jákup Skoradal nú aftur sæti í býráðnum, og verður samstundis biðið um heimild frá býráðnum til, at hetta farloyvið víðari verður umsitið av borgarstjóranum, vegna býráðið, eftir omanfyristandandi leisti.

Býráðsins samtykt: Samtykt

66.

09/00649 Farloyvi frá býráðsarbeiðinum - Eyðgunn J. Samuelsen.

Í skrivi 2. sept. 2009 søkir Eyðgunn J. Samuelsen, býráðslimur, um farloyvi frá býráðsarbeiðnum frá 1. sept. 2009 vegna løgtingsarbeiðið, og at næsti persónur á javnaðarlistanum tekur sætið. Eyðgunn boðar sjálv frá, tá ið hon tekur sæti aftur.

Næsti persónur á javnaðarlistanum er Signhild V. Joensen, ið sostatt tekur sæti í býráðnum í farloyvistíðarskeiðnum.

Býráðsins samtykt: Samtykt

67.

09/00447 Sundurbýti av matr. nr. 11 á Norðoyri

Talan er um at býta sundur neysta- og sethúsaogn, soleiðis at hesi verða hvør sín sjálvstøðugur matrikul. – Tekniska Umsiting mælir til at játta.

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmæli frá TU, dagfest 24. aug. 2009

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

68.
09/0539 Marknaumskipan, matr. nr. 136a og 136b í Klaksvík

Endamálið við umskipanini er at regulera markið millum ognirnar, soleiðis at tað samsvarar stoypta garðinum á staðnum. Umskipanin er fult í tráð við ásetingarnar í byggisamtyktini. - Av serligum orsøkum bleiv málið sent Umhvørvisstovuni (matrikul) til góðkenningar beinanvegin eftir móttøku. – Nevndin verður tí við hesum kunnað um umsøktu umskipan.

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 24. aug. 2009

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

69.

09/00625 Uppskot til javning av veg- og kloakkgjøldum í kommununi

Víst verður til skriv frá Atla S. Justinussen, býráðslimi, dagfest 26. august 2009. Á býráðsfundi 20. nov. 2007 varð samtykt at hækka veg- og kloakkgjaldið fyri privat grundøkir úr kr. 100,-/m^2 upp í kr. 200,-/m^2 fyri max 500 m^2. Sostatt fór maximum gjaldið úr kr. 50.000,- upp í kr. 100.000,- pr. grundøki. Sambært prísyvirliti frá Búnaðarstovuni eru prísirnir fyri landsjørð m.a bólkaðir eftir plasering, og er fyri bygdirnar í Klaksvíkar Kommunu hesin býtislykil galdandi: *Klaksvík: 1; *Norðoyri:1; *Ánir:1; *Árnafjørður 0,50; *Mikladalur: 0,25; *Trøllanes: 0,25; *Svínoy: 0,25.

Verður hugt at veg- og kloakkgjaldsspurninginum eftir tí prinsippinum, sum uppskotsstillarin leggur upp til, og prísurin av landsjørð verður nýttur sum lutfall, verður veg- og kloakkgjaldið í kommununi hetta: Klaksvík og Norðoyri kr. 200,-/m^2, Árna-fjørður kr. 100,-/m^2 , Mikladalur, Trøllanes og Svínoy kr. 50,-/m^2

Tekniska Umsiting er samd við uppskotstillaranum í, at veg- og kloakkgjaldið úti á bygdunum er sett rættiliga høgt í mun til, hvat grundøkini kunnu seljast fyri, og mælir til, at býráðið viðger veg- og kloakkgjaldið fyri bygdirnar av nýggjum við útgangsstøði í omanfyri nevndu uppskotum.

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmæli frá TU, dagfest 28. aug. 2009

Fíggjarnevndin tekur undir við Teknisku Nevnd 8. sept. 2009

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

70.
09/00459 Kommunalar veitingar – Sjómannadagurin 2009

Umboð fyri Føroya Sjómannadag hava á fundi við umsitingina biðið um størri játtan, enn avsett er – kr. 100.000,-
Í samráð við formannin í mentanarnevndini verður mælt til hesar tillagingar:

At flyta av	450 253	kr.	5.000,-
	450 750	kr.	20.000,-
	450 754	kr.	10.000,-
	*690 200	kr.	10.000,-
Tilsamans		kr.	45.000,-

Samlaða játtanin verður tá kr. 145.000,- Av hesum nýtir Vegadeildin kr. 20.000,- til ljósketur, perur og flagging. Restupphæddin, kr. 125.000,- verður flutt Føroya Sjómannadegi. Sí skriv frá umsitingini, dagfest 2. sept. 2009, har upplýst verður, at borgar-stjórin, sum umsitur kontu 690200, hevur givið tilsøgn um hesa broyting/flyting.

Mentanarnevndin tekur á fundi 14. sept. 2009 undir við tilmæli, dagf. 02.09.2009.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 16. sept. 2009 undir við tilmæli frá MeN, dagf. 14.09.2009.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

71.

09/00518 Avdráttarskái – Grunnurin Mentanarhúsið Atlantis

Stýrið fyri Atlantis hevur roynt at fáa eina loysn á fíggjarligu trupulleikum grunsins, eitt nú við einum avdráttarskáa fyri lán grunsins. Sambært viðtøkum grunsins krevur ein slík undantøka góðkenning býráðsins.

Mentanarnevndin er kunnað um málið 14. september 2009.

Fíggjarnevndin er 16. september 2009 kunnað um málið og tekur avdráttarskáan upp á 3 mánaðar til eftirtektar.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

72.

09/00660 Gøtunøvn til góðkenningar

Á fundi í Gøtunavnanevndini 31. august 2009 var semja um at skjóta hesi nøvn upp:

1. *Vegurin til nýggju íbúðarbyggingina í Ánunum:*
   Nevndin mælir til, at vegurin fær navnið Edmundstrød, tí Edmund var maðurin, sum legði trøðna inn og bygdi á hana. Samstundis verður staðfest, at Ánabygd er vaksin suðureftir og strekkir seg nú heim til omankoyringina til Norðhavnina

2. *Oman Reyðhús – framhaldstrekki:*
   Nevndin mælir til, at strekkið frá "Brekkuni" og norðuryvir verður nevnt Grótvegur, tí hann gongur út "í Grótið"

3. *Møguligt navn til nýggja síðuvegin úr Ringvegnum undir Fossum:*
   Nevndin mælir til, at veganavnið "Niðan Horn" heldur fram oman í rundkoyringina (førir við sær, at verandi nummerering av húsunum má broytast)

4. *Buchwald í Ánunum*
   Ein hólmur liggur leysur úr landi, og tí er navnið "Grønhólmur" misvísandi. Nevndin mælir ístaðin til, at navnið verður "Grønhøvdi"

5. *Vegur oman úr Strandavegi norðan fyri El-verkið*
   Nevndin mælir til at kalla vegin "Fjøruvegur"

Tekniska nevnd tekur undir við tilmæli frá Gøtnavnanevndini.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt, tó verður pkt. 5 beint aftur í Gøtunavnanevndina við áheitan um nýggja viðgerð.

73.

09/00315 Bygging av ellis- og røktarheimi í miðbýnum – gjald fyri tekningar

Í skrivi frá Mentanardeildini, dagfest 14. september 2009, verður mælt til, at kr. 10.000,- verða fluttar av kontobólki 450, sum umsitingin útpeikar – hesin peningur verður fluttur Byggi- og Býarskipanarnevndini, sum hevur lagt peningin út.
Hetta verður gjørt, tí skotbráið var so stutt at fremja ætlanina, at neyðugar avsetingar annars ikki kundu verða gjørdar.

Mentanarnevndin tekur á fundi 14. sept. 2009 undir við tilmæli, dagf. 14.09.2009.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 16. sept. 2009 undir við tilmæli frá MeN, dagf. 14.09.2009.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

74.

09/00282 Fíggjarætlan 2010 – Býráðið

Vísandi til §39 í Kommunustýrislógini samtykti fíggjarnevndin á fundi 16. september 2009 at leggja eitt uppskot til fíggjarætlan fyri 2010 fyri býráðið, har skattainntøkurnar verða mettar til 119,0 mkr., og at hesin karmurin verður grundarlagið fyri víðari viðgerðini í nevndum og býráðið.
Á temafundi 21. sept. 2009 varð uppskot nr. 1, sum javnvigar við 119 mkr. í skattainntøkum, 85,9 mkr. í rakstrarútreiðslum og 18 mkr. í íløgum, lagt fyri býráðið til gjøgnumgongd og umrøðu.
Avrátt varð, at málið verður beint til allar nevndir, fíggjarnevndina og býráðið, sum á teimum báðum fylgjandi fundarumførunum (í oktober og november) viðgera fíggjarætlanina, herundir hava onkrar eykafundir um málið. Somuleiðis verður enn ein eyka temafundur millum allar býráðslimir í oktober.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt